listastevna føroya arts festival

# Gallaríð Oyggin hýsir listaframsýning

**Sum partur av Listastevnu Føroya er listaframsýning á Tvøroyri í hesum døgum. Gallaríð Oyggin hýsir málningum hjá trimum listamálarum**

LISTASTEVNA FØROYA
*Heini í Skorini*

Meðan borgarstjórin í Klaksvík ikki er nøgdur við, at Listastevnan ikki er komin norður í myrkri í Klaksvík, kunnu íbúgvarnir á Tvøroyri harafturímóti gleðast um, at teir eisini hava møguleika at fáa ein bita av mentanarkøkuni.

Gallaríð Oyggin á Tvøroyri hýsir nevniliga málningum hjá trimum listamonnum, og er tað tvørámaðurin Palli Julsgart saman við navnframa Kára Svensson, sum sýna listadygdir sínar. Saman við báðum føroyingunum luttekur ein útlendingur eisini á gallaríðnum.

Gallaríð Oyggin hevur havt opið í 2-3 ár, og hevur talan allatíðina verið um tætt samstarv við sjálvan miðdepilin á stevnuni, Norðurlandahúsið.







*Í hesum døgum hýsir Gallaríð Oyggin á Tvøroyri listaframsýning*

# Sera Chaplinskt

**Ovfarandi er ikki nøktandi orð at lýsa ósjónliga sirkussið hjá Victoria Chaplin og Jean-Babtiste Thierrée, sum tók øll á bóli í Norðurlandahúsinum mikukvøldið. Og í tí løgna endanum tóku áskoðararnir eisini sirkusparið á bóli**

LISTASTEVNA
*Rúnar Reistrup*



*»Hvat er hatta fyri nakað mamma?« spurdu børnini upp í saman alt kvøldið*

Allur salurin reistist í berum ovfarni og gav sirkusparinum standandi lógvabrestir, meðan tey bæði Victoria Chaplin og Jean-Babtiste Thierrée fyrst bukkaðu og so annars hildu fram við at ovfara við nýggjum smáum sirkusinnsløgum. Eitt, tvey og seks ella sjey nýggj smá innsløg á pallinum bleiv tað til, alt meðan fólk stóðu uppi og klappaðu.

So bleiv salurin eitt sindur ljósari, og áðrenn nakar visti av, vóru hálvtrýss børn farin av sínum plássi og inn á pallin, har tey jagstraðu dunnur og eina yvirvaksna kanin.

Men framførslan var ikki liðug enn. Aftan fyri leiktjøldini stóðu Victoria Chaplin og Jean-Babtiste Thierrée og fyrireikaðu seg til stóru finaluna, men hon kom ongantíð. Tí tey (kanska í so) framligu føroysku børnini kundu ikki bíða longur eftir at sleppa at hitta sirkusdjórini andlit til andlit, og tey (kanska í so) passivu foreldrini fingu seg ikki til at steðga teimum.

## Øll bilsin

Tað var stórt spell, tí hóast framførslan vardi í yvir tveir tímar, so hungraði yvirritaði eftir meir, og tað gjørdu nógv onnur eisini. Áskoðararnir í salinum vóru ovfarin av at man kann gerast so ovfarin so ofta, og í gjáramorgunin kundu listastevnufyrireikararnir siga frá um at onkur av áskoðarunum beinanvegin hevði tryggja sær atgongumerki aftur til næstu sýning.

Sambært Listastevnufyrireikarunum gjørdust Chaplin og Thierrée ógvuliga ovfarin av at føroysku børnini vóru so... framlig. Men tey vóru hvørki firtin ella ónøgd, bara ovfarin, bilsin og paff, sum restin av fólkinum í Norðurlandahúsinum hetta løgna kvøld.

## Hvat er hatta mamma?

Hvat ósjónliga sirkusið, ella »Le Cirque Invisible« er, er ikki so lætt at greiða frá. Onkuntíð er tað vanligt sirkus við klovni og línudansara, onkuntíð gandakynstur fyri børn, og so kemur knappliga okkurt heilt annað, sum vekir tankar til lívs og drepur øll fyrivarni, so tú ikki kanst annað enn at gapa og svølgja øllum rátt, sum Chaplin og Thierrée skapa á pallinum.

Spurningurin »Hvat er hatta fyri nakað mamma?« man hava verið sagdur við undrandi rødd fleiri túsund ferðir í Norðurlandahúsinum mikukvøldið, tí hann hoyrdist sum ein støðugur undirtóni ígjøgnum alla framførsluna. Og løgi var tað. Meginparturin av áskoðarafjøldini vóru barnafamiljur, og meðan børnini stuttleikaðu seg óført tá sirkusparið gandaði við kaninum, dunnum og dúgvum, sótu tey sum í einari fremmandari verð tá pallframførslan knappliga gjørdist ómetaliga løgin og hugtakandi. Og á sín egna sermerkta hátt, stuttlig. Chaplinsk.



*Zebrair, strutsar, fiskar, kaninir og øll møgulig onnur djór vóru á palli. Nøkur teirra verulig, men flestu teirra spæld av Victoriu Chaplin*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kristian Djurhuus 60

Í dag, fríggjadagin 8. august, fyllir Kristian Djurhuus í Havn 60 ár. Hann er sonur Esther, f. Lützen, sum var tannlækni, og Jóhan Djurhuus, fyrrverandi skrivstovustjóra hjá Landsstýrinum.

Kristian tók studentsprógv í Hoydølum í 1965. Hann fór til Danmarkar at lesa og tók prógv sum tannlækni. Heimafturkomin starvaðist hann á Tannlæknastovuni hjá móðurini, og síðani hon legði frá sær, hevur hann rikið Tannlæknastovuna víðari. Hann hevur tveir tannlæknar aftrat sær.

Kristian er giftur við Birgith Jacobsen úr Vági og tey eiga trý børn, tveir synir og eina dóttir.

## Davia Henriksen, heimahjálp 25 ára starvsdag



7. august hevði Davia Henriksen 25 ára starvsdag í Heimarøktini í Sandoynni. Davia, f. Clementsen, er fødd á Sandi 20. november 1941. Hon er gift við Jón Mikkjal Henriksen, (Nonna), og eiga tey 5 børn.

Davia hevur nógv áhugamál. Hon hevur stóran áhuga í sjónleiki og er virkin í fornminnisfelagnum. Hon er deknur í Sands kirkju, og hevur góða rødd bæði til sang og upplestur, sum mong hava gleði av.

Við hesum fáu orðum ynskja vit Daviu hjartaliga tillukku við hesum stóra degi.

Bestu heilsanir

**Starvsfelagar í Heimarøktini, Sandoyar øki**

## KFUK-skótarnir 75 ár



*KFUK skótar í dag*

9. mai vóru 75 ár liðin síðan fyrstu KFUK-skótarnir í Føroyum lovaðu lyftið. Tað var Henrietta Hansen av Gørðunum í Vági, sum stovnaði fyrsta gentuskótaarbeiði í Føroyum. Sambært gerðabókunum hava fleiri gentur verið innmeldaðar longu 2. januar 1928 og fyrsti "prøvin", sum tá varð kallaður rekrutprøvin, er tikin 3. mai.

Á stórari samkomu í KFUK tann 9. mai 1928 lovaðu 28 gentur og leiðarar lyftið. Av teimum fyrstu leiðarunum kunnu nevnast, umframt frøkin Hansen (sum skótarnir kallaðu Henriettu) eisini Bette Poulsen í Havn. Petra Højgaard (gift Rasmussen) úr Rituvík, Helga Christiansen (gift Øregaard) úr Kvívík og Olivia Arge (gift Gregoriussen) í Havn.

Henrietta var læraralærd í Danmark, áðrenn hon bleiv skrivari í KFUK í Havn, sum hon sjálv stovnaði í 1920. Sum skrivari gjørdi hon ofta ferð niður til Danmark á skeið, og har fekk hon innlit í KFUK-skótaarbeiðið. Hon var sera hugtikin av hesum spennandi ungdómsarbeiði og við góðari vegleiðing frá KFUK-skótunum í Danmark, sum vórðu stovnaðir í 1919, stovnaði hon so gentuskótarnar í Havn.

Ein tíð gekk, áðrenn lóg, lyftið, skótasangir o.a. blivu umsett til føroyskt, so at fyrsta lyftið varð lovað á donskum:"Jeg lover på min Ære efter bedste Evne, at være tro mod Gud og mit Fædreland, at være hjælpsom mod alle Mennesker og holde Spejderloven".

Til 50 ára haldið í 1978 varð ein nýggj grein av KFUK-skótum stovnað. Einaferð skóti – altíð skóti, verður sagt, og hetta hildu eisini nógvar av teimum tilkomnu kvinnunum, sum vóru við til hátíðarhaldið, at okkurt mátti gerast við. Síðan hevur 4. grein verið virkin. Teirra 25 ára stovningardagur varð hildin fríggjakvøldið 9. mai í KFUK, har umleið 25 "gamlir" skótar vóru møttir.

75 ára dagurin varð hildin í KFUK sunnudagin 11. mai 2003. Eftir guðstænastuna í Havnar kirkju var døgurði fyri innbodnum á Hotel Hafnia. Eisini var almenn móttøka í KFUK og legubál á KFUK-trøðni.

*Kelda: KRUNG 3/2003: Ása Olsen*



## Kolbein Simonsen 50 ár

5. august fylti Kolbein Simonsen í Havn 50 ár. Kolbein er havnarmaður, sonur Sigrid, f. Henriksen, úr Sandavági, og Jóhan Simonsen, skipara, úr Hoyvík. Kolbein er útbúgvin radiomekanikari, hann lærdi í S.H. Jacobsens Radiohandli í Havn og arbeiddi har í nógv ár. Hann hevur eisini arbeitt á Elektron. Annars er hann best kendur innan føroyska tónleikalívi, har hann spælir bassgittara. Hann hevur spælt og spælir saman við ymiskum tónleikarum sum t.d. Ólavi Øster, Rúnu á Heygum og Georg Eystan Á. Eisini siglir hann nógv við Norrønu sum tónleikari.

## Dagurin

7. Rut. Dagurin vígdur minninum um kvinnuna, sum Rutsbók í Gamla testamenti er skrivað um. Týdningurin av bibilska navninum er ókendur, kanska merkir tað *vinkona* ella *trúgv*.